Bilar

Nr. 138 • fríggjadagur • 22. juli 2005 • 79. árg.

# Off-roadarar sum limousinur

**Eins og í USA er tað vorðið alt meira vanligt at síggja langar luksuslimousinur við myrkum rútum koyra á evropeisku vegunum. Nú eru tað ikki einans langir persónbilar, men eisini "off-roadarar" sum t.d. Hummer H2 og Porsche Cayenne**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin*

**Birmingham:** Tað er ikki óvanligt at nýta serligar bilar, tá okkurt heilt serligt er á vási, sum t.d. brúðarvígslur, almennar vitjanir ella aðrir merkisdagar. Talan kann vera um nýggjar luksusbilur ella flott ellisakfør.

Í amerikonskum filmum síggja vit javnan at fín fólk koyra í longum luksuslimousinum. Orðið limousine er franskt og merkir: Stórur innilokaður bilur við plássi til í minsta lagi 5 ferðandi.

Seinnu árini er tað vorðið alt meira vanligt at síggja langar limousinur við myrkum rútum á evropeisku vegunum. Nú er tað ikki einans longdir persónbilar, men eisini "off-roadarar" sum t.d. Hummer H2, Porsche Cayenne og BMW X5.

At Porsche gera sportsvognar vita tey flestu, men at teir eisini gera "off-roadarar" er tað nokk ikki øll sum vita. Tað eru nú nøkur ar síðan teir komu á marknaðin við frítíðarbilinum Porsche Cayenne, um er ein av heimsins kvikastu 4x4. Cayenne er so gott sum sami bilur sum VW Touareg.

Á vitjan í Onglandi komu vit fram á ta fyrstu Porsche limousinuna í Onglandi. Talan er um ein Cayenne, sum er uppbygdur í USA. Bilurin er umleið 12 metur langur og sær rættuliga sermerktur út. Innan er alt luksus og leður við nýggjastu tøknini og øllum, sum hoyrir til ein slíkan bil. Porsche Cayenne fæst við motorum heilt upp til 500 hk.

Eisini amerikanski jeepurin Hummer, sum bleiv serliga kendur undir Flógvakrígnum fyrst í 90-unum, verður nú eisini uppbygdur sum limousina. Hummer er so avgjørt ikki ein bilur, sum vanliga verður settur í samband við eina luksuslimousinu. Hvat ein slíkur bilur vigar, er ilt at meta um, men í vanligu útgávuni vigar hann 2,8 tons.

Mest vanliga limousinurnar av teimum heilt longu eru t.d. amerikansku Ford Lincoln og Cadillac, men ein bilur sum frítíðarbilurin BMW X5 verður eisini uppbygdur í USA sum limousina, og koyra teir á evropeisku vegunum. Tað fyrsta ein leggur til merkis við longu limousinum er, at teir síggja so "óendaliga" langir út, og fólk venda sær á gøtuni.

Í USA eru fleiri fyritøkur ið uppbyggja vanligar bilar til limousinur. Bilarnir verða faktiskt bygdir upp av nýggjum, og prísurin er ofta fleiri ferðir tað, sum bilurin upprunaliga kostaði.






*Á vitjan í Onglandi komu vit fram á ta fyrstu Porsche Cayenne limousinuna í Onglandi*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Porsche Cayenne er umleið 12 metur langur og sær rættuliga sermerktur út*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Innan er alt luksus og leður við nýggjastu tøknini og øllum, sum hoyrir til ein slíkan bil*